

# ELVIR SØLIBAT TIL PEDOFILI?

NÚ GØLAN UM KATÓLSKIR **PRESTAR** OG **SEXUELT** MISBRÚK AV BØRNUM EISINI RULLAR Í DANMARK OG NOREGI, ER STÓRI SPURNINGURIN, UM **SØLIBAT**, ELLA **KYNSLIGT** FRÁHALD, ELVIR TIL **PEDOFILI** Í SJÁLVUM SÆR



**BAKGRUND**

**Rigmor Dam**
rigmor@sosialurin.fo

Eftir at fyrrverandi danski bispurin, Jan Lindhardt, í einum kronikki í Kristeligt Dagblad róði fram undir, at sølibatið avskeplar vanligt vit og skil – eisini í mun til, hvat ein kann loyva sær við børnum, hevur eitt øgiligt kjak tikið seg upp um hetta í donskum miðlum.

Kronikkin hevur fingið ilt í katólsku kirkjuna, sum vil vera við, at sølibat og pedofili hevur ikki samband við hvørt annað. Eisini krevja prestar í katólsku kirkjuni eina treytaleysa umbering frá Jan Lindhardt, sum vil vera við, at "vónleysa kravið um sølibat spillir vit og skil", sum hann málbar seg í Kristeligt Dagblad í vikuni.

## Má endurnýggja seg

Tað er ikki einans fyrrverandi bispurin, sum hevur hesa áskoðan. Teologurin Peter Lodberg frá Aarhus Universitet mælir eisini staðiliga katólsku kirkjuni til at endurskoða sølibatið og duldu sexualmentanina, sum hevur rátt í mannaminni.

- Katólska kirkjan í Danmark og úti í heimi hevur ment eina mentan, har sexualiteturin verður hildin niðri, og har til ber at krógva sínar sexuellu vanar og lystir. Kirkjan noyðist tí at umhugsa, um sølibatið kanska birtir upp undir eina ósunna sexuella mentan, sum er dragandi fyri pedofilar, sigur Peter Lodberg við DR.

## Vanligari millum katólskar prestar

Lindhardt grundgevur við, at pedofili er so nógvar ferðir vanligari millum katólskar prestar enn aðrar, og at orsøkin er, at teir liva í sølibati. Hetta, saman við herdu tagnarskylduni hjá prestum, gevur eina óhugnaliga samanrenning, tí teir sleppa at hóreiggja sær, sum teimum lystir, uttan at verða avdúkaðir.

- Tað vísir seg, at pedofili er nógv meira umfatandi millum katólskar prestar enn millum aðrar kristiligar prestar. Og nýggjar avdúkingar koma alsamt tættari at heilaga pávanum himself. Hetta ber als ikki til, skrivar Lindhardt.

## Sølibat er orsøkin

Lindhardt heldur ikki, at loysnin hevði verið, at avtikið tagnarskylduna hjá øllum prestum. Tað hevði, eftir hansara sannføring, verið órættvíst mótvegis teimum prestum, sum virka í samkomum, har pedofili og harðskapur móti børnum ikki er so umfatandi, sum tað eftir øllum at døma er innan summar katólskar samkomur.

- Nei, trupulleikin er sølibatið. At prestar skulu liva uttan sex. Luther, sum var avhaldandi í 10 ár í klostrinum, var í øðini um alt tað góða, sum hann hevði forsømt, tá hann sjálvur kom úr klostrinum, sigur Lindhardt í kronikkinum. Og hann vísir til Luther, sum giftist einari fyrrverandi nunnu, og sum restina av lívinum tvíhelt um, at maður og kvinna eru skapt fyri hvørt annað.

- Tí hava vit prestagarðar við manni, konu og fleiri børnum. Tó ikki so nógvum børnum sum fyrr. Og tað hevur givið prestunum stóra fragd, umframt at hækka útbúgvingarstøði og intellektuella støðið í landinum. Børnini fingu jú eina góða byrjan í einum heimi við nógvum bókum, sigur Lindhardt í kronikkinum í Kristeligt Dagblad. Hann endar